# Kundamóttakari

## til P/F Wenzel bilverkstað

P/F Wenzel hevur eitt vælvirkandi bilverkstað, sum hevur nakrar dugnaligar bilsmiðir og lærlingar, sum dagliga loysa tær uppgávur, ið viðskiftafólk okkara bjóða okkum.

Tínar uppgávur
- Avgreiða kundar okkara
- Útfakturering
- Planlegging av arbeiði
- Leiða og skipa dagligu arbeiðsgongdina saman við verkastjóranum.

Vit hugsa okkum at
- tú hevur viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- tú hevur telduroyndir á brúkarastøði
- tú ert opin og fyrikomandi
- tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur hug at læra nýggjar arbeiðshættir

Tú fært eitt
Sera spennandi arbeiði í eini fyritøku, sum setur útbúgving, góðsku, persónliga útvikling og effektivitet sera høgt.

Løn eftir avtalu.

Hevur tú spurningar
Tosa við Anthonius Dalsgaard, verkastjóra.

Send umsókn tína til

**P/F Wenzel**
Akranesgøta 5
100 Tórshavn
Att.: Anthonius Dalsgaard
merk brævbjálvan »Kundamóttakarin«



## Aðalskrivari í Føroya Ungdómsráð

Leitar tú eftir avbjóðingum og einum spennandi starvi, so kann hetta vera júst starvið, tú leitar eftir. Føroya Ungdómsráð, sum er felagsskapur fyri skipaðu barna- og ungdómsfelagsskapirnar í Føroyum, søkir eftir aðalskrivara fulla arbeiðstíð.

**Í starvinum skalt tú:**

- Røkja dagliga virksemi felagsins
- Samskifta við øll viðkomandi
- Gera vanligar skrivstovuuppgávur
- Virka sum skrivari
- Samskipa tiltøk í Føroyum og í Norðurlondum
- Halda heimasíðuna við líka og senda tíðindaskriv út, tá tørvur er á tí

**Vit vænta at tú:**

- Hevur royndir innan barna og/ella ungdómsarbeiði
- Ert røkin og fyrikomandi
- Ert dugnalig/ur at samskifta og samskipa
- Dugir væl at skriva føroyskt
- Dugir at tosa og skriva á norðurlendskum
- Fyrimunur er, um tú eisini tosar og skrivar enskt.
- Dugir at nýta teldu á brúkarastigi.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og eisini skalt tú verða sinnað/ur at fara av landinum í arbeiðsørindum.
Tú kanst fáa meira at vita um starvið við at venda tær til Andreu Eldevig á tlf 218108.

*Umsóknir saman við møguligum viðmælum og prógvum, skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 27. mai 2002.*

**Føroya Ungdómsráð**
**Tinghúsvegur 18, 4h.**
**110 Tórshavn**



veitst tú ikki tað? Sosialurin



## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Nissan Primera LX 1.6, 4 hurðar, sedan
**Árg.:** 1995
**Km.:** 115.000

Bilurin er skaddur í høgru síðu.
Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
Tlf.: 345600 – lokal 728
Fax: 345607

at hitta mánadag til hósdag millum kl. 08.30 – 10.00 og fríggjadag 08.30 – 16.00.



FØROYA LÆRARASKÚLI

**Læraraútbúgvingin**

## Vilt tú vera lærari?

Nú er greitt at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00-16.00.

Treytirnar fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

**Læraraútbúgvingin**

– ein útbúgving fyri lívið



## Frá Runavíkar Skúlastýri

Lýsing eftir lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/2003.

Talan er um
- 8 størv á 26,5 lønartímar fyri lærarar í farloyvi
- 1 starv á 10 tímar um vikuna til ein fjølbrekaðan næming, sum fer í 1. flokk.

Serliga er brúk fyri lærarum, sum kunnu undirvísa í smíð, dreingjaítrótti og alis/evnafrøði.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at ringja 447331 ella 217331.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 28. mai.

**Runavíkar Skúlastýri**
v/ Malan Rasmussen
Bakkavegur · FO 645 Søldarfjørður



ÍBýin
- hvønn hósdag



veitst tú ikki tað?

Sosialurin




Búskapur og vinna:

### Boykotta norskar vørur

Jødiskir felagsskapir í USA mæla nú sínum limum til at boykotta norskar vørur og annars alt, sum er norskt. Orsøkin er, at formaðurin í fakliga landsfelagsskapinum í Noregi hevur mælt fólki til at boykotta Ísrael og ísraelskar vørur.

Norska blaðið Aftenposten skrivaði í gjár, at jødisk vinnulívsfólk í USA hava tikið seg saman og hava mælt amerikanskum jødum frá at keypa norskar vørur. Teir hava eisini mælt amerikanskum jødum frá at fara til Noregs at ferðast.

Norsku útflutningsmyndugleikarnir halda kortini ikki, at jødiska boykottið fær ta ætlaðu ávirkanina. Eitt nú verður sagt, at hetta er einki aftur ímóti teimum tiltøkum, sum av og á verða sett í verk ímóti norskari hvalaveiði.

### Kunnu spara nógv

Danskar fyritøkur kunnu spara fleiri milliónir krónur í telefonnýtsluni. Ein kanning, sum umfatar meiri enn 100 stórar danskar fyritøkur, vísir, at fyritøkurnar hugsa ov lítið um, hvussu nógvar pengar tær í veruleikanum nýta til telefon, og at tær kundu spart nógv.

M. a. vísir kanningin, at nógvar fyritøkur hava meiri enn ein veitara til telesamskiftið. Høvdu tær bert hann ein veitara, kundu tær spart nógvar pengar. Sum dømi verður nevnt, at ein fyritøka, sum legði alt undir ein veitara, hevur spart eina millión krónur hetta seinasta árið.

### Oljan verður dýr

Serfrøðingar á altjóða oljumarknaðinum vænta, at oljuprísurin fer at verða í meðal 23 dollarar fyri tunnuna í ár. Tað er tveir dollarar oman fyri tað, sum serfrøðingarnir mettu fyri einum mánað síðani.

Heilt neyvt vænta teir, at meðalprísurin í ár verður 22,71 dollarar. Um orsøkin til tann hækkandi prísin verður sagt, at príshækkingin kemst fyrst og fremst spenninginum í Miðeystri og einari útlitunum fyri búskaparligum framburði í ár.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Søguligur NATO-fundur í Reykjavík



*Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, er millum luttakararnar á fundinum í Reykjavík*
*Mynd: Reuters*

**Uttanríkisráðharrarnir í teimum 19 NATO-londunum skulu á fundi í Reykjavík geva Russlandi størri ávirkan á verjusamgonguna**

NATO
*Árni Joensen*

Teir 19 uttanríkisráðharrarnir í NATO fóru í gjár undir ein fund, sum kann gerast søguligur. Fundurin er í Reykjavík, og har skulu ráðharrarnir taka støðu til, hvørja støðu Russland skal hava í samstarvinum við ta vesturlendsku verjusamgonguna. Hetta er fyrst ferð, síðani NATO varð skipað fyri 53 árum síðani, at hesin spurningurin er til viðgerðar, og tí er russiski uttanríkisráðharrin, Igor Ivanov, boðin við á fundin.

Ætlanin er at skipa eitt serligt ráð, sum skal taka sær av samstarvinum millum NATO og Russland. Eftir reglugerðini hjá ráðnum fær Russland atkvøðurætt á jøvnum føti við NATO-londini í málum, ið snúgva seg um bardagan ímóti yvirgangi, hópoyðingarvápnum, samstarv í evropeiska loftrúminum og sivilum bjargingartiltøkum.

NATO hevur alla tíðina lagt dent á, at samstarvið við Russland skal í fyrsta umfari einans umfata tey øki, sum partarnir longu samstarva um, men kortini hava embætismenn sitið saman seinastu dagarnar, tí full semja er ikki í NATO.

Russiska stjórnin hevur sagt, at hon vil hava ein sáttmála, sum eisini gagnar Russlandi, men í gjár skrivaðu altjóða tíðindastovurnar úr Reykjavík, at tað er ivasamt, um ruusar fáa tað, teir vilja hava.

USA skrivar ikki undir

# Kyoto-sáttmálan tey næstu tíggju árini

**Amerikanski samráðingarleiðarin í umhvørvistingingunum sigur, at USA fer at umhugsa sáttmálan aftur um tíggju ár**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

Stjórnin hjá George W. Bush, forseta hevur sýtt fyri at skriva undir og staðfesta altjóða Kyoto-sáttmálan um at avmarka tann veksandi hitan á Jørðini. Stjórnin sigur, at sáttmálin fær alt ov ógvusligar ávirkanir á amerikanska búskapin, verður hann bindandi fyri USA.

Nú sigur amerikanski samráðingarleiðarin í umhvørvistingingunum, Harlon Watson, at USA fer ikki at skriva undir sáttmálan tey fyrstu árini. Tað hevur ljóðað, at stjórnin í Washington hevur umhugsað at staðfesta sáttmálan um trý ár, tá sáttmálin skal endurskoðast, men tað avsannar Watson.

- Vit fara at taka málið framaftur um tíggju ár, og so fáa vit at síggja, hvussu vorðið er tá, segði Harlon Watson í London í gjár.

Úr Norðurlondum:

### Vilja keypa TV2

Danski mentamálaráðharrin Brian Mikkelsen boðaði mánadagin frá, at stjórnin ætlar at privatisera sjónvarpsstøðina TV2. Fyrst skal stovnurin skipast sum eitt alment partafelag, og síðani skal partafelagið seljast. Um keypararin verður danskur ella útlendskur hevur minni týdning, segði ráðharrin.

Fleiri tykjast longu hava áhuga í at keypa TV2. Millum teirra, sum longu hava sagt seg hava áhuga í støðini, eru bløðini Jyllandsposten, Politiken, Berlingske Tidende og blaðhúsið Egmont. Egmont eigur sum er part av norska TV2.

Stjórin í Det Berlingske Officin, Joachim Malling, sigur, at har í húsinum fara tey av álvara at viðgera spurningin um at keypa TV2. Hann vísir á, at lýsingainntøkurnar hjá bløðunum minka, og tí kundi tað verið áhugavert at keypt sjónvarpsstøðina fyri at fingið nakrar inntøkur afturat.

### Aftur ein tikin

Norska sjóverjan tók í gjár ein russiskan trolara, tí kanningar umborð avdúkaðu, at skiparin hevði ikki ført dagbókina sambært reglunum. Russiski trolarin fekk boð um at fara inn til Hammerfest.

Fyri einari viku síðani tók norska sjóverjan ein annan russiskan trolara, tí hann royndi á einari stongdari leið.

### Lata aftur

Starvsfólkini á danska blaðnum Børsens Nyhedsmagasin fingu rættiliga hvøkk mánadagin, tá eigarin brádliga boðaði frá, at blaðið steðgar í næstum. Tað er svenska felagið Bonnier, sum eigur Børsens Nyhedsmagasin. Bonnier eigur eisini Økonomisk Ugebrev, og tað steðgar eisini.

Á Børsens Nyhedsmagasin undrast tey á avgerðina, tí blaðið hevur havt fíggjarligt avlop. Men sambært Bonnier er avlopið ikki nóg stórt.